# Føroyskir yvirmenn í oljuvinnuni onga trygd

*Í tvey ár hevur Skipara- og navigatørfelagið roynt at fáa sáttmála fyri yvirmenn við føroyskum skipum í frálandavinnuni, men higartil hevur tað verið til fánýtis.*



*Í tvey ár hevur Skipara og naviagørfelagið rikist ímillum Reiðarafelagið fyri farmaskip og teir einstøku reiðararnar til onga nyttu. Men nú skal tað fáa ein enda, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Yvirmenn, ið sigla við føroyskum skipum í frálandavinnuni eru illa fyri.

Teir hava nevniliga ongan sáttmála og hava tískil onga trygd.

Eitt nú eru teir ikki umfataðir av tryggingini, sum Skipara- og navigatørfelagið hevur.

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagið sigur, at tey hava roynt nú í tvey ár at fáa sáttmála fyri yvirmenninar.

– Higartil hevur tað ikki so frægt sum eydnast at fáa samráðingar í lag.

–Men nú skal tað vera, tí at liggja í sáttmálaloysi longur, verður ikki góðtikið, sigur hann.

Hann sigur, at tað eru tvey ár síðani, at Skipara og Navigatør vendi sær fyri tveimum árum síðani til Reiðarafelagið Fyri Farmaskip og roundi at fáa samráðingar um ein sáttmála.

–Vit hildu, at tað var lættari, heldur enn at samráðast við hvørt reiðarí sær.

– Men felagið vísti okkum burtur, tí tey einstøku reiðaríðini vóru ikki limir í felagnum og tí hevði tað onki við málið at gera

– Reiðarafelagið Fyri Farmaskip vildi heldur hava málið útsett til tær vanligu sáttmálasamráðingarnar skuldu vera.

Formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagið sigur, at síðani vendu teir sær beinleiðis til reiðaríðini, men onki kom burturúr.

– Men tá ið tær vanligu samráðingarnar so vórðu, førdi Reiðarafelagið fyri farmaskip aftur einaferð enn fram, at skipini í frálandavinnuni vóru ikki limir í felagnum og tí kundu samráðingar ikki vera um tað.

Ellintur Abrahamsen sigur, at teir vildu ikki sleppa málinum, so teir bóðu ein einaferð um fund, hesuferð við tey einstøku reiðaríðini.

Men tey bóðu eisini um samráðingar við Reiðarafelagið fyri farmaskip tí tey høvdu hoyrt graml um, at eitt skip var á veg undir føroyskt flagg og skuldi vera limir í felagnum.

**Heilt burturvið**

Ellintur Abrahamsen sigur, at fundur varð so avtalaður við tey einstøku reiðaríini týsmorgunin.

– Men mánadagin kom ein áheitan úr Vinnuhúsinum á reiðararnar um ikki at fara á fundin, tí tað verður roynt at fáa teir upp í Reiðarafelagið Fyri Farmaskip.

Sostatt møttu bara fýra av reiðarunum upp og tískil kom onki burturúr.

Ellintur Abrahamsen heldur, at tað er heilt burturvið, at Reiðarafelagið Fyri Farmaskip soleiðis leggur seg út í samráðingarnar, sum felagið hevur víst frá sær í tvey ár.

**Onga trygd**

Ellintur Abrahamsen sigur, at sostatt liggur málið enn óloyst.

– Men støðan er ómetaliga óheppin hjá yvirmonnunum við hesum skipunum.

– So leingi teir ikki hava sáttmála, eru teir t.d. ikki umfataðir av frítíðarvanlukku- og lívstryggingini, sum Skipara- og Navigatørfelagið hevur gjørt, saman við hinum manningarfeløgum.

Harumframt hava teir sjálvsagt heldur ikki ta trygd, sum ein sáttmáli annars gevur.

**Fáa 14 dagar**

Ellintur Abrahamsen sigur, at Skipara- og navigatørfelagið hevur nú avtalað nýggjan fund um 14 dagar fund við teir fýra reiðararnar sum møttu til fundin týsmorgunin.

– Tá fara vit at royna at fáa allar hinar reiðararnar við eisini.

–Hin møguleikin er sjálvsagt, at Reiðarafelagið fyri farmaskip fær sáttmála við okkum um hesar yvirmenninar, áðrenn teir 14 dagarnir eru farnir.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tey eru ikki sinnað at lata hetta draga longur út, tí nú skal ein sáttmáli gerast fyri yvirmenninar í frálandavinnuni.

# Skal gera Suðuroy bíligari

*Stóra handilsketan Bónus hevur nú latið handil upp á Tvøroyri*



*Bónus hevur nú latið handil upp á hølunum á Tvøroyri, har N.J.Mortensen hevur havt handil í mannaminnir.*



*Janus Rasmussen er leiðari í nýggja Bónus handlinum á Tvøroyri. størsti dentur verður lagdur á at hava gott kjøt og stórt úrval av grukt og grønmeti. Og Bónus skal altíð verða bíligasi handil í Suðuroy, sigur stjórin*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Vit skulu vera bíligasti handil í Suðuroynni.

Tað er herrópið, nú stóra handilsketan Bónus eisini hevur latið handil upp í Suðuroynni.

Tað var mikudagin, at tann sjeyndi Bónushandilin í Føroyum læt upp, og tað var á Tvøroyri, í hølunum, har N.J. Mortensen áður hevur havt handil í mannaminnir.

Niels Mortensen, stjóri, sigur, at teirra fremsta mál er, at tað skal vera bíligari at keypa í Bónus.

– Eins og aðrastaðni skal Bónus í Suðuroy verða bíligari enn hinir handlarnir.

Tað skal kortini ikki ganga útyvir dygdina, tí Bónus-ketan keypir vørur í stórum og tað gevur teimum nógvar fyrimunir við avsláttri av ymsum slag. Tí eru teir eisini førir fyri at selja vørurnar so bíligar, sum tilber.

Annars fer Bónus í Suðuroynni at leggja størsta dentin á kjøtvørurnar og frukt og grønmeti.

– Vit fara at hava eitt stórt úrval av frukt og grønmeti í handlinum á Tvøroyri. Og feskt kjøt fáa vit hvønn dag úr Miklagarði í Havn, so dygdin er fyrsta floks, sigur Niels Mortsen.

Av og á fara tey eisini at skipa fyri ymsum tiltøkum fyri at gerah andilin meiri áhugaverdan, tað kann t.d. vera smakkiroyndir o. tíl.

Hann sigur, tey hava leingi havt ætlanir um at lata handil upp í Suðuroy, uttan at tað er blivið til nakað fyrrenn nú.

Men hann dylir heldur ikki fyri, at tað, at tíðirnar eru blivnar betri ger, at teir hætta sær undir at lata nýggjan handil upp.

Leiðari í Bónus í Suðuroy er Janus Rasmussen, sum hevur staðið í Læru í Miklagarði

Frammanundan hevur Bónus handil í Klaksvík, tríggjar handlar í Eysturoy, umframt tveir handlar høvuðsstaðnum Bónus og Miklagarð í SMS.



# Eldraíbúðirnar longu fullsettar

*Í góðveðrinum mikumorgunin setti býráðsformaðurin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, fyrsta spakan til eldraíbúðirnar í jørðina. Áhugin er stórur, og fleiri umsóknir eru komnar inn enn talið av íbúðum*

STEFAN Í SKORINI



*Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík, setti mikumorgunin, á lítlari samkomu, fyrsta spakan í jørðina til eldraíbúðirnar*

Talan er um 24 íbúðir, harav nakrar eru 50 fermetrar og nakrar eru 70 fermetrar. Eisini verður eitt sambýli bygt við plássi til 16 fólk.

– Fólk hava víst sera stóran áhuga, og vit hava longu fingið fleiri umsóknir enn er pláss fyri, sigur Jógvan við Keldu.

Tey fyrstu kunnu flyta inn um tvey ár í oktober 2002. Tá verður sambýli eftir ætlan liðugt. Tær fyrstu íbúðirnar verða klárar í januar 2003, og til ber at flyta inn í tær seinastu íbúðirnar í apríl sama ár.

**Leiguíbúðir**

Býráðið hevur lagt stóran dent á, at íbúðirnar skulu verða til leigu og ikki eigaraíbúðir.

– Tá íbúðirnar eru til leigu, er tað nógv einfaldari, um onkur skal flyta inn og annar út, enn um talan var um eigaraíbúðir. Endamálið er, at íbúðirnar altíð skulu verða í nýtslu, sigur Jógvan við Keldu.

Íbúðirnar verða bygdar undir Kráarbrekku, sum er ovalaga á Stongunum. Tað er felagið RST Contractors við Svend Lamhauge í Lamba, sum skal standa fyri arbeiðnum at planera og gera klárt til sjálva byggingina.

Arbeiðið at byggja íbúðirnar og sambýlið verður boðið út í næstum, og tí verður ikki upplýst nakað nágreiniligt um prísin. Kostnaðurin verður tó einastaðni millum tær 20 og 30 milliónirnar.

Klaksvíkar kommuna, Vistarheimsnevndin og Íbúðargrunnurin seta í felag 15% í verkætlanina. Restin verður fíggjað sum lán av íbúðargrunninum. Talan er um eitt 30 til 40 ára lán.

**Royndarætlan**

Jógvan við Keldu sigur, at hetta er ein royndarætlan og tann fyrsta av sínum slag í Føroyum. Um hetta eydnast væl verður økið, sum liggur beint við síðuna av, eisini nýtt til slíkar íbúðir.

Økið er longu lagt av til byggingina, men enn er eingin ítøkilig ætlan løgd av býráðnum. Har verða eini 26 íbúðir tøkar afturat, um ætlanin verður sett í verk.

# Smádrongur í Runavík misnýttur

*Týsdagin var ein níggju ára gamal smádrongur kynsliga misnýttur av einum fremmandum manni, sum fyrr er dømdur fyri sama brotsverk*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ein níggju ára gamal smádrongur í Runavík fekk sítt lívs skelk týsdagin.

Á veg til handils í døgverðatímanum, var hann steðgaður av einum bilførara, sum spurdi um hann kundi vísa sær vegin til Rituvíkar. Ungi maðurin varð beinasamur og settist innar.

Bilførarin helt nú leiðina fram eftir vegnum fram við fótbóltsvøllinum móti Rituvík, men komin til krossin Rituvík-Æðuvík, snaraði hann út eftir tí vegnum ístaðin. Eftir at hava koyrt eitt pettið eftir hesum vegnum, steðgaði hann bilinum, og fór at gera seg inn á drongin.

Ungi beinasami drongurin var, sum vera man hjartkiptur, og tordi ikki at gera mótstøðu. Tíbetur fyri hann, gavst maðurin rættuliga skjótt, við tí hann hevðist at, og hann vendi aftur móti Runavík.

Hann slepti dronginum av aftur júst á sama staði, har hann hevði tikið hann upp. Komin úr aftur bilinum, helt smádrongurin til beins, heim til húsa, at boða foreldrunum frá, og tað vóru tey, sum meldaðu til løgregluna, sigur Oluf Mortensen, vakthavandi í Runavík.

**Er dømdur fyri somu gerð**

Vakthavandi á støðini í Runavík sigur, at maðurin, sum framdi ógerðina, er ikki haðani. — Hann býr í Havn, men var altso komin inn higar, sigur hann.

Tað var rættuliga skjótt, at løgreglan fann fram til mannin, sum er 37 ára gamal og býr í høvuðsstaðnum. Maðurin er nevniliga kendur av løgregluni, og hann er — tíverri, staðfestir løgreglan — eisini kendur fyri júst sama brotsverk.

Í 1997 fekk maðurin nevniliga ein dóm fyri kynsliga misnýtslu av smábørnum, og tá sat hann í fýra mánaðir.

Bergleif Brimvík, leiðari á Kriminaldeildini á støðini í Havn, váttar, at teir hava havt tann 37 ára gamla mannin til avhoyringar, og at hann er skuldsettur fyri brotsgerðina.

- Jù, tað er rætt. Vit hava havt ein mann til avhoyringar fyri at hava gjørt seg inn á ein smádrong úr Runavík týsdagin. Maðurin er eisini skuldsettur, men hann varð sleptur út aftur á gøtuna, tá avhoyringin var liðug, sigur Bergleif.

Leiðarin á kriminaldeildini vil als ikki tosa um hvørja revsing maðurin kann vænta sær. Hann vísir á, at maðurin hevur fingið ein dóm, sum er sitin, og at hann nú er skuldsettur fyri sama brotsverk.

Hann vísir kortini á, at revsiramman fyri brotsgerðina er upp til tíggju ára fongsul, men hann staðfestir, at tað er siðvenjan hjá rættinum, sum verður avgerandi fyri hvussu hørð revsingin verður.

